# Gongubreytarumvælingar í Havn

**Í hesum døgum hevur Tórshavnar kommuna veruliga brotið upp um ermar, hvat ið vegarbeiði og –umvæling viðvíkur**

EYDNA SKAALE
*eydna@sosialurin.fo*

Fleiri av gongubreytunum í miðbýnum í Havn hava leingi trongt til eina kjerliga hond, og nú kemur hon endiliga. Tórshavnar býráð hevur nevniliga stungið fleiri umvælingar út í kortið.

Býráðið sjálvt viðgongur eisini, at serliga gongubreytirar í miðbýnum eru í so ringum standi, at tær eru til ampa fyri tey mongu ferðandi í miðbýnum.

Eisini nógvir av vegbrunnunum eru illa farnir, og teir verða tí skiftir í sama viðfangi.

Borgarstjórin sigur, at arbeiðið er lagt soleiðis til rættis, at tað skal órógva minst møguligt, og tí verður tað gjørt í fleiri stigum.

Ætlanin er, at alt arbeiðið skal vera liðugt 1. November í ár.

**1. stig**

Í eina tíð hevur nú ikki verið gangandi á gongubreytini á Áarvegnum, framvið Hotel Hafnia og oman til Seytjan, tí øll gongubreytin, sum hon er, er uppgrivin.

Her verða m.a. kantsteinar skiftir út og nýggjar flisar lagdar á.

Tað arbeiðið verður liðugt einaferð beint eftir hvítusunnu.

**2. stig**

Á gongubreytini á Sverrisgøtu og Tinghúsvegnum, niðan til Bøkjarabrekku, fara teir at asfalterað av nýggjum.

Arbeiðið byrjar í komandi viku, og verður ætlandi liðugt um miðjan juni.

**3. stig**

Á gongubreytini á Niels Finsens gøtu, frá Sjónleikarhúsinum og oman ímóti Kongagøtu,. Hevur býráðið tikið avgerð um, at leggja nýggjar flísar á.

Arbeiðið er ætlað at byrja nakrar dagar fyri jóansøku og at verða liðugt fyrst í september.

So er bara at vóna, at býráðið hevur tikið hædd fyri Ólavsøkuni, og teimum mongu fólkunum, sum tá ætla sær at spáka oman og niðan á júst tí teiminum.

**4. Stig**

Á vegamótinum Tórsgøta og Sverrisgøta, verða kantsteinar settir upp, og brúgvasteinar lagdir. Arbeiðið er ætlað at byrja seinast í august og at verða liðugt um miðjan september.

Tórsgøta og Sverrigøta verða tá ætlandi stongdar eina viku, meðan steinarnir verða lagdir.




*Umvælingararbeiðið, sum Tórshavnar býráð longu er farið undir á Áarvegnum, er bert fyrsta stig av 4. Í alt summar verða ymsar gongubreytir í miðbýnum umvældar.*
Mynd Jens Kr. Vang

## Týr selur í USA

Plátufelagið Tutl hevur seinastu tíðina merkt ein øktan áhuga úr USA fyri tónleikinum hjá Týr

Týr selir alsamt fleiri fløgur í USA. Plátufelagið Tutl hevur seinastu tíðina merkt ein øktan áhuga úr USA fyri tónleikinum hjá Týr, og hetta kemst helst av, at umrøðu á internetinum. Eisini sølan í Týsklandi og Finnlandi gongur væl.

Týr hevur biðið um pláss í danska Hansen Studio í heyst. Har skal triðja fløgan hjá Týr takast upp. Hetta er sama studio, sum seinasta fløgan hjá bólkinum, Eric The Red, varð tikin upp.

Týr er ein av bólkunum, sum er boðin at spæla á Atlantic Music Event tann 23. apríl.

M ó t t ø k a



Ali Celebi



Christian C. Nielsen

Í sambandi við at
Christian C. Nielsen
fer í annað starv, og
Ali Celebi tekur við sum
nýggjur stjóri í P/F Trygd
1. mai 2005 bjóða
vit til móttøku
á Trygd í Gongini 7

**fríggjadagin**
**15. apríl kl. 15-17.**

TRYGD